Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard

**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Orðaskifti í staðin fyri orðastríð

## *Oddagrein*

UPPSKOTIÐ til fíggjarlóg fyri 2001 er ikki kollveltandi, men almenningurin fær gott innlit í, hvat landsstýrið hevur í umbúna. Ikki minst innan samferðsluviðurskifti, har nógvar útbyggingar skulu gerast, eins og nógvar íløgur skulu gerast í skip, ferjur og tunnlar.

HARAFTURAT ætlar nýggi landsstýrismaðurin at umskipa ymiskar flutningstænastur, so privatpersónar ella feløg skulu reka hesar tænastur í staðin fyri, at Strandferðslan rekur tær. Í hesum sambandi er setningurin at gera eina útbjóðingarlóg, sum skal fevna um felst øll øki hjá Strandferðsluni.

TEy flestu vita, at Fólkaflokkurin hevur havt torført at góðtaka, at Strandferðslan hevur havt Farmaleiðir og Bygdaleiðir um hendi. Í nógv ár var tað fastur táttur hjá Dagblaðnum at skriva um teir reyðu lastbilarnar hjá Strandferðsluni. Men tað er nú einaferð so, at Strandferðslan bygdi upp hesar tænastur, har ongar tænastur vóru frammanundan. Tað ber altíð til at kjakast um, hvussu tað hevur gingið, men sum heild er tænastan vælvirkandi og fólk eru kring landið fegin um, at tað hevur borið til at fáa pakkar og flutning til dyrnar – ella nærum.

TÍÐIR broytast, og nú eru vit í eini tíð, har vanligt er at bjóða ella lisitera út tænastur. Skulu vit ganga hesa leið, so er ógvuliga umráðandi, at lógargrundarlagið er gott, og tryggjar, at vit – virki og einstaklingar – fáa ta optimalu og neyðugu tænastuna. Somuleiðis mugu sáttmálarnir verða soleiðis, at øll tey almennu áhugamálini vera tryggjað.

SPURNINGURIN, hvussu nógv og hvørjar almennar tænastur skulu bjóðast út, ella almennir stovnar skulu reka tær, er ofta ein spurningur, sum skilur vinstra og høgra í politikki. Tað hevur higartil verið gott latín, at tað almenna skal reka tænastur, sum ofta eru eitt úrslit í strembanini at byggja upp eitt gott vælferðarsamfelag. Men seinastu árini hevur gongdin verið at luta ymiskar tænastuveitingar út. Tað verður ásannað, at tænastan er komin upp á beinini, og at tað er ikki neyðugt, at tað almenna sum so hevur tænastuna um hendi í allar ævir. Serliga ikki, um tað er rationellari og bíligari at lisitera út.

Í Evropa hava flokkar til vinstru ikki bara tikið undir við slíkari hugsan, men hava eisini gingið á odda at umskipa nógvar av teimum almennu tænastunum. Í Føroyum er enn skotgravskríggj um henda spurningin. Meiri áhugavert hevði verið at fingið eitt veruligt orðaskifti um henda spurning.

***Sosialurin***

# Upptøkutól við á konsert

*Tá Kular Røtur og Trølla Pætur hava konsert í Havn leygardagin verða upptøkur eisini gjørdar til komandi sjónbandið við Kulum Rótum*



*Jógvan Hansen er ein av sangarunum í Kulum Rótum, sum hava stóra konsert í Havn leygardagin*

Leygardagin verður stórsligið konserttiltak í ítróttarhøllini á Hálsi.

Tá fara Kular Røtur á pallin við øllum kanónunum sum hoyra til. Har verða Trølla-Pætur, Trølla-Omman, Kári Cool, dansarar, sangarar og tónleikur. Eisini verður myndashow á stórskíggja.

Talan verður um slíkt barnatiltak, sum tað er óvanligt at bjóða fram í Føroyum. Tónleikurin er upprunaligur føroyskur tónleikur, sum stílar eftir børnunum og ungum, men sum á vegnum rak mong vaksin eisini.

Kular Røtur hava útgivið tvær sera væl umtóktar fløgur síðani jólamánaðin í fjør, og seinni í ár kemur næsta sjónbandið hjá Kulum Rótum. Seinastu tíðina eru upptøkur gjørdar, og á konsertini leygardagin verður eisini upptøkutól til staðar, sum skal gera upptøkur til sjónbandið.

Sangarar í Kulum Rótum eru Jógvan Hansen, Arnfríð Lützen, Brandur Enni og Rannvá Lützen. Tey verða øll við á konsertini, sum byrjar leygardagin klokkan 17.00.

# Kappast um tarv í Klaksvík

**Klaksvík:** Leygardagin fer Klaksvíkar Róðrarfelag at skipa fyri eini av teimum spennandi neytalortakappingunum.

Kappingin, sum verður í Gerðabø, er um ein tarv, sum vigar omanfyri 700 pund. Eitt øki verður býtt upp í teigar, og fólk kunnu so keypa sær ein teig.

Leygardagin klokkan 14.00 verður tarvurin so sleptur inn á økið, og tann sum eigur økið, har fyrsti lorturin hjá tarvinum lendir á, hevur vunnið tarvin.

Luttøkubrøv fáast til keyps í róðrarneystinum í kvøld frá kl. 20.00 til 22.00 og fríggjakvøldið frá kl. 20.00 til 24.00. Eisini kunnu fólk ringja til fyrireikararnar á tlf 455771 & 217573 og fáa luttøkubrøv koyrd til dyrnar, um bústaðurin er í Norðoyggjum Eitt luttøkubræv kostar 100 kr.

Peningurin, sum kemur inn, fer allur, sum hann er, til keyp av nýggjum bátum til Klaksvíkar Róðrarfelag.

# Skylda bankunum 6,5 mia

ÁKI BERTHOLDSEN

Føroyingar læna pengar í bankum og sparikassum, sum teir ikki hava gjørt síðani tey stuttligu áttatiárini.

Í løtuni skylda føroyingar bankum og sparikassum 6.523 milliardir krónur.

Tað mesta, vit hava lænt, hava vit lønt frá sparikassunum, 3.775 milliardir.

Restin, 2.749 millard, er lænt frá bankunum.

Hetta eru alt rund tøl.

So høg sum hetta, hava útlánini ikki verið síðani allarfyrst í nítiárunum.

Men tað eru ikki bara útlánini sum veksa, tað gera innlánini eisini.

Í august í ár áttu føroyingar 7.834 millardir á bók og tað er eisini eitt tal, ið, sum hæld gongur uppeftir.

Av teimum stóðu 4.403 milliónir í sparikassunum og restin, 3.431 millardir stóðu í bankunum.

Sostatt eru útlánini hjá føroysku peningastovunum 83% av innlánunum. Fyrst í nítiárunum vóru tey 112%



*Savnsmynd*

## Treytir fyri valgreinar

Av royndum vita vit, at sera nógv verður skrivað, tá val er í hondum. Tí hevur blaðleiðslan gjørt av, at innsent politiskt tilfar í samband við kommunuvalið komandi verður avmarkað í longd til eina A4 síðu í vanligari skrift - ella áleið 3.000 tekn - saman við andlitsmynd av valevninum.

Øll valevni er kortini vælkomin at skriva í Sosialinum, men tilfar, ið ikki lýkur treytirnar, kemur ikki í blaðið.

**Blaðleiðslan**



Hevur tú kannað rentuna?



Seinastu 12 mánaðirnar hevur íløgufelagið Altjóða Partabrøv hjá Kaupthing givið 54% í rentu og seinastu trý árini 113%. Nú kanst tú, sjálvt við fáum túsund krónum, gera íløgur í virðisbrøv. Støkk inn á gólvið hjá okkum ella einari av deildunum hjá Føroya Sparikassa og fá meiri at vita.

Rentan er roknað í tíðarskeiðunum fram til 1. september 2000. Søguligur vinningur er ikki trygd fyri framtíðar vinningi.

KAUPTHING
FØROYAR · ÍLØGUBANKI
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com

SANSIR TEL 355355